

www.oljan.fo

**Jan Müller** 07 - 12 - 2011

# Leiv Eiriksson úr Grønlandi til Falklandsoyggjar

Tað var tann tíð fyri góðum túsund árum síðani, at norski víkingurin Leiv Eiriksson, sonur Eirik Reyða, helst sum tann fyrsti legði leiðina suður í hav, úr Grønlandi og fann Vínland - Amerika. Nú leggur enn ein Leiv Eiriksson leiðina úr Grønlandi og suður í hav. Men hesaferð er víkingasnekkjan skift út við nútímans oljuboripall og hesaferð gongur leiðin heilt suður til Falklandsoyggjarnar - fyri at finna olju. Tann risastóri boripallurin Leiv Eiriksson hevur nú í nakrar mánaðir borað eftir olju og gassi í Grønlandi fyri skotska oljufelagið Cairn Energy. Undan tí arbeiddi hann í har eysturi í Miklagarði í Turkalandi. Nú felagið hevur tikið time out í leitingini í Grønlandi komandi ár, hevur eitt annað oljufelag, FOGL leigað pallin til boring við Falklandsoyggjarnar. Leiv Eiriksson hevur longu sett kós móti Suðurpólsleiðunum. Pallurin skal bora tveir brunnar í apríl og mai næsta ár. Higartil eru boraðir nakrir brunnar við Falklandsoyggjarnar, og teir hava staðfest, at har er ein virkin kolvetnisskipan í undirgrundini eins og brunnar hava víst bæði í Føroyum og Grønlandi. So spennandi verður at fylgja við í hvørjum av hesum oyggjalondum fyrsta lønandi oljufundið verður gjørt.
Myndir - Boripallurin Leiv Eiriksson til Falklandsoyggjarnar Standmynd av Leiv Eirikssyni Farleið hansara, tá hann fann Vínland Víkingasnekkjan, sum førdi Leiv til Amerika